




## Bárður Nielsen

*Vestmanna hevur ábyrgd av kappróðrinum á Fjarðastevnuni:*

**Hvat er serligt við eini stevnu sum Fjarðastevnuni?**
-- Tað er sjálvandi mest kappróðurin sum fólk gleða seg til og sum fólk koma til bygdina fyri at fylgja við í. Hinvegin, er so nógv annað á skránni í dag, og tað er ikki sama stevnan í dag sum fyrr. Men kappróðurin hevur kortini sera stóran áhuga millum fólk.

**Hvat gleðir tú teg sjálvur mest til?**
-- Tað er sjálvandi kappróðurin, og hvussu tað fer at ganga bátunum úr Vestmanna. Dreingirnir umborð á Havfrúnni vunnu barnaróðurin seinasta leygardag, og tað gekk akkurát ikki hjá Vestmenningi hjá 10-mannaførunum í Vági. Men hesaferð vænti eg at teir fara at vinna á Eysturoyingi.

**Hvat fert tú at gera á Fjarðastevnuni?**
-- Eg hava havt úr at gera við at fyrireika kappróðurin, ikki minst hesa vikuna og tað verður tað sama leygardagin. Eg skal eisini handa vinnandi bátsmanningunum steypini. Aftaná tað fari eg til hús, har vit fáa fitt av fólki til nátturða.

# Føroysk fuglabjørg í Keypmannahavn

**Eitt føroysk fuglaberg við lunda, álku og lomviga verður nú gjørt í Zoologiska havanum í Keypmannahavn. Verkætlanin er partur av »Den arktiske ring«, har ísbjarnir eisini verða at síggja**

Inna Tørnroos

Ein stór gávu frá A.P. Møller áljóðandi 150 milliónir er orsøkin til, at Zoologiski havi kann byggja »Den arktiske ring«. Gávan er tann størsta nakrantíð í søguni hjá 150 ára gamla havanum.

Ísbjarnir og kópur eru longu at síggja, men tey fáa nýtt heim, tá Arktiski ringurin verður liðugur á vári 2012.

Gjørligt verður at síggja bæði djórini úr eini glastunli og uttandura.

Fuglabergið sær út at líkjast landslagnum í Føroyum. Í Zoologiska havanum siga tey, at lundi, álka og lomvigi verða at síggja flúgvandi, tá tey hvíla á rókini og tá tey kasta seg eftir mati. Í glastunlinum verður gjørligt at síggja, hvussu fuglurin svimur undir vatni.



*Modell av, hvussu fuglabergið fer at síggja út tá tað er liðugt 2012*

Yndismaturin hjá ísbjarnunum – kópurin – fer at liva síðu um síðu við ísbjarnirnar.

Ein tjúkkur glasrútur ger, at kóparnir ikki gerast ísbjarnamatur.

inna@sosialurin.fo

## Í DAG

*5/ 10 °C*



3-8 m/s 5-10 m/s

Lot til andøvsgul 3 til 8 m/s av landsynningi, í støðum upp í stívt andøvsgul, 10 m/s. Ælaveður, men eisini sól av og á. Hitin millum 10 og 14 stig. Í kvøld og út á náttina andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðuri, 8 til 13 m/s, sum veksur upp í stívt andøvsgul upp í hvassan vind, 10 til 15 m/s. Skýggjað fyri tað mesta og kanska regn. Hitin fellur niður millum 8 og 10 stig.

## LEYGARDAGIN

*8/ 12 °C*



8-13 m/s 8-13 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðuri, 10 til 15 m/s av suðuri og mest skýggjað og regn. Út á dagin snarar hann í ein útsynningi og minkar niður í andøvsgul upp í ein strúk, 8 til 13 m/s. Okkurt ælið, men møguliga klárnar eitt sindur og tað verður sól. Hitin alt samdøgurið millum 10 og 15 stig.

## SUNNUDAGIN

*8 / 12 °C*



8-13 m/s 8-13 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk, 8 til 13 m/s, í støðum upp í hvassan vind, 15 m/s, fyrst at landsynningi og suðuri, seinni snarandi í ein útsynning. Skýggjað og regn, seinni ælaveður og hitin millum 9 og 14 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ







## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juni Fullmáni
1. juli Mánin longst frá jørðini
4. juli Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** |
| 2. juli | 11:39 | 23:57 | 10:39 | 22:57 | 10:54 | 23:12 | 01:21 | 13:39 | 02:21 | 14:39 | 09:54 | 22:12 | 08:54 | 21:12 | 11:54 | - | 00:36 | 12:54 | 11:24 | 23:42 | 00:21 | 12:39 |
| 3. juli | - | 12:15 | 11:15 | 23:46 | 11:30 | - | 01:57 | 14:15 | 02:57 | 15:15 | 10:30 | 23:01 | 09:30 | 22:01 | 00:12 | 12:30 | 01:12 | 13:30 | - | 12:00 | 00:57 | 13:15 |
| 4. juli | 00:46 | 13:18 | - | 12:18 | 00:01 | 12:33 | 02:46 | 15:18 | 03:46 | 16:18 | 11:33 | - | 10:33 | 23:05 | 01:01 | 13:33 | 02:01 | 14:33 | 00:31 | 13:03 | 01:46 | 14:18 |
| 5. juli | 01:50 | 14:23 | 00:50 | 13:23 | 01:05 | 13:38 | 03:50 | 16:23 | 04:50 | 17:23 | 00:05 | 12:38 | 11:38 | 23:58 | 02:05 | 14:38 | 03:05 | 15:38 | 01:35 | 14:08 | 02:50 | 15:23 |
| 6. juli | 02:43 | 15:03 | 01:43 | 14:03 | 01:58 | 14:18 | 04:43 | 17:03 | 05:43 | 18:03 | 00:58 | 13:18 | - | 12:18 | 02:58 | 15:18 | 03:58 | 16:18 | 02:28 | 14:48 | 03:43 | 16:03 |